## Alonso vil víðari

Xabi Alonso fer helst ikki at spæla við Liverpool í komandi kappingarári. Miðvallarin hevur gjørt venjaranum og leiðsluni greitt, at hann ikki hevur ynski um at halda fram í felagnum. Alonso hevur leingi verið settur í samband við Real Madrid, og tað tykist nær um greitt, at hann fer at spæla við spanska kongafelagnum. Prísurin sigst verða góðar 25 milliónir pund.



## Mouritsen søkti HB

Christian Mouritsen flongdi av álvara sínar fyrrverandi liðfelagar úr HB á ólavsøku. Hann var á miðvøllinum hjá B36, sum spældi ólavsøkudyst móti eldru grannunum. Árstalsfelagið vann 4-2, og Christian Mouritsen skeyt trý av málunum. Tað var kanska avmarkað, hvussu í stórum álvara liðini tóku dystin. Venjararnir góvu fleiri av leikarunum, sum ikki hava fingið nógva spælitíð higartil í ár, møguleikan. Magnus Olsen stóð fyri einum máli hjá B36, og Rasmus Nolsøe og Fróði Benjaminsen komu á máltalvuna fyri HB. Myndina hava vit lánt frá www.hb.fo.

# tu met í avhølving



Norðoyastevnu fóru stavn um stavn um málið. Úrslitini boða frá, at framgongdin hjá Klaksvíkingi hevur verið størri, enn hon hevur verið hjá Eysturoyingi.

At ólavsøkuroyndin hjá Eysturoyingi ikki var heppin varð undirstrikað í, at Eysturoyingur fyri fyrstu ferð í ár ikki kom á mál sum annar av teimum fremstu. Meðan Klaksvíkingur longu í startspurtinum stakk seg skutin og hálva bátslongd framum hinar bátarnar, so eydnaðist tað ongantíð Eysturoyingi at vinna seg fram á næstfremsta plássið. Ormurin Langi var allan tann stutta teinin næstfremstur, og hann var lítlan skut frammanfyri Eysturoying, tá ið teir fóru um málið.

Havnarbáturin luttók fyri fyrstu ferð í ár. Men hóast lítla venjing, so var tað um reppið, at Havnarbáturin fekk fatur á Eysturoyingi. Tað var bara reingin – og kanska minni enn so - á muni, tá ið bátarnir fóru um málið.

Altjóða manningin umborð á Hoyvíkingi fekk staðfest, at tað ber til at uppliva áskoðarafjøld í kappróðri, sum spælir leiklut, ið minnir um, tá ið tað verður kappast í t. d. fótbólti. Altjóða rógvararnir fingu eisini staðfest, at hóast teir eru trimmaðir so væl, at teir teljast millum teir bestu í heiminum, so er tað at rógva í føroyska bátinum heilt øðrvísi og krevur tekniskar førleikar, sum tað er neyðugt at venja meiri enn í eina viku.

## 10-mannafør á Ólavsøku
## Vinnarar og tíðir 1973-2009

| | |
|---|---|
| Havnarbáturin | 13 ferðir |
| Nólsoyingur | 6 ferðir |
| Eysturoyingur | 5 ferðir |
| Vestmenningur | 5 ferðir |
| Skálabáturin | 5 ferðir |
| Klaksvíkingur | 2 ferðir |
| Tvørabáturin | 1 ferð |
| | |
| 2009 | |
| Klaksvíkingur | 3.56.19 |
| Ormurin | 4.03.15 |
| | |
| 2008 | |
| Havnarbáturin | 4.00.04 |
| Ormurin | 4.03.01 |
| | |
| 2007 | |
| Eysturoyingur | 4.07.06 |
| Vestmenningur | 4.09.09 |
| | |
| 2006 | |
| Klaksvíkingur | 4.02.22 |
| Eysturoyingur | 4.05.03 |
| | |
| 2005 | |
| Eysturoyingur | 4.06.16 |
| Vágbingur | 4.10.05 |
| | |
| 2004 | |
| Havnarbáturin | 4.05.02 |
| Vágbingur | 4.05.10 |
| | |
| 2003 | |
| Nólsoyingur | 4.03.11 |
| Eysturoyingur | 4.03.13 |
| | |
| 2002 | |
| Vestmenningur | 4.06.07 |
| Eysturoyingur | 4.06.23 |
| | |
| 2001 | |
| Havnarbáturin | 3.52.03 |
| Vestmenningur | 3.53.22 |
| Eysturoyingur | 3.55.04 |
| | |
| 2000 | |
| Vestmenningur | 4.06.18 |
| Havnarbáturin | 4.07.21 |
| | |
| 1999 | |
| Eysturoyingur | 4.03.21 |
| Vestmenningur | 4.04.12 |
| | |
| 1998 | |
| Eysturoyingur | 4.16.18 |
| Havnarbáturin | 4.17.04 |
| | |
| 1997 | |
| Vestmenningur | 4.05.18 |
| Havnarbáturin | 4.06.14 |
| | |
| 1996 | |
| Havnarbáturin | 4.03.14 |
| Skálabáturin | 4.03.23 |
| | |
| 1995 | |
| Skálabáturin | 4.11.19 |
| Vestmenningur | 4.14.05 |
| | |
| 1994 | |
| Skálabáturin | 3.58.24 |
| Vestmenningur | 3.59.52 |
| | |
| 1993 | |
| Skálabáturin | 3.59.72 |
| Havnarbáturin | 4.05.40 |
| | |
| 1992 | |
| Skálabáturin | 3.52.00 |
| Havnarbáturin | 3.52.32 |
| Vestmenningur | 3.56.04 |
| | |
| 1991 | |
| Skálabáturin | 3.58.80 |
| Havnarbáturin | 3.58.84 |
| | |
| 1990 | |
| Havnarbáturin | 4.12.20 |
| Nólsoyingur | 4.15.30 |
| | |
| 1989 | |
| Nólsoyingur | 4.03.40 |
| Havnarbáturin | 4.04.50 |
| | |
| 1988 | |
| Eysturoyingur | 4.02.60 |
| Havnarbáturin | 4.03.90 |
| | |
| 1987 | |
| Vestmenningur | 4.08.90 |
| Nólsoyingur | 4.09.70 |
| | |
| 1986 | |
| Nólsoyingur | 4.07.30 |
| Havnarbáturin | 4.10.20 |
| | |
| 1985 | |
| Nólsoyingur | 4.32.10 |
| Havnarbáturin | 4.32.20 |
| | |
| 1984 | |
| Vestmenningur | 4.07.60 |
| Floksbáturin | 4.08.00 |
| | |
| 1983 | |
| Nólsoyingur | 4.02.80 |
| Vágbingur | 4.05.10 |
| | |
| 1982 | |
| Havnarbáturin | 3.58.10 |
| Nólsoyingur | 3.59.20 |
| | |
| 1981 | |
| Tvørabáturin | 4.11.20 |
| Havnarbáturin | 4.11.40 |
| | |
| 1980 | |
| Havnarbáturin | 4.15.60 |
| Vágbingur | 4.16.50 |
| | |
| 1979 | |
| Nólsoyingur | 4.18.40 |
| Havnarbáturin | 4.19.70 |
| | |
| 1978 | |
| Havnarbáturin | 4.10.00 |
| Tívil | 4.11.60 |
| | |
| 1977 | |
| Havnarbáturin | 4.09.80 |
| Skálabáturin | 4.13.00 |
| | |
| 1976 | |
| Havnarbáturin | 4.03.00 |
| Skálabáturin | 4.05.90 |
| | |
| 1975 | |
| Havnarbáturin | 3.58.90 |
| Skálabáturin | 4.01.00 |
| | |
| 1974 (eingin tíð) | |
| Havnarbáturin | |
| Skálabáturin | |
| | |
| 1973 (eingin tíð) | |
| Havnarbáturin | |
| Skálabáturin | |